# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Hetta er dagurin, sum allir pakistanar, ið virða demokrati og mannarærttindi, hava bíðað so leingi eftir*

## Í morgin fer hon heimaftur

**Eftir átta ára útlegd fer Benazir Bhutto aftur til Pakistan í morgin**

- Um hesa tíðina í morgin siti eg umborð á einum flogfari á veg til Karachi. Tað er dagurin, sum eg og allir pakistanar, sum virða demokrati og mannarætt-indi, hava bíðað leingi eftir, segði Benazir Bhutto á tíðindafundi í Dubai í morgun.

Fyrrverandi forsætisráð-harrin hevur búð í útlegd, síðani hon í 1999 bleiv skuldsett fyri svik. Skuld-setingarnar eri kortini sleptar eftir einari avtalu millum Bhutto og Pervez Musharaf, forseta, men enn hevur pakistanski hægsti-rættur ikki gjørt av, um hann góðtekur avtaluna.



*Benazir Bhutto*

## Aftur russisk bumbuflogfør á okkara leiðum

**Gjáranáttina mátti norska loftverjan aftur senda flogfør at fylgja russiskum bumbuflogførum**

Gjáranáttina varnaðist norska loftverjan tvey fremmand flogfør 75 fjórðingar norðan fyri Senja. Tað vísti seg, at talan var um tvey russisk bumbuflogfør av slagnum Tu-160 ella Blackjack, sum tey verða kallað vestanfyri.

Norska loftverjan sendi F16-jagaraflogfør at fylgja teimum báðum russisku flogførunum. Tey flugu suður við norsku strondini og síðani vestureftir millum Bretsku Oyggjarnar og Føroyar, har bretsk jagara-flogfør hildu eyga við teimum.

Tu-160 hevur verið partur av russisku verjuni síðani 1987. Hetta er tað tyngsta hernaðarflogfarið, sum nakrantíð er bygt.



*Tað vóru tvey flogfør av slagnum Tu-160, sum flugu fram við norska markinum gjáranáttina*

## Hart stríð um gamalt skipsvrak

**Eitt spanskt herskip hótti við at skjóta eftir einum ameri-konskum skipi, sum hevði sent kavarar niður til eitt gamalt skipsvrak**



*Odyssey Explorer og spanska herskipið uttan fyri Algeciras*

Gjáramorgunin kom eitt spanskt herskip til Algeciras við amerikanska skipinum Odyssey Explorer, sum herskipið hevði tikið úti í Atlantshavinum. Umborð á spanska herskipinum vóru teir ikki í iva um, at ameri-kanararnir høvdu havt kav-arar niðri á einum gomlum skipsvraki, og at teir høvdu tikið gull og annað virðis-mikið upp úr vrakinum. Tá spanski skiparin bað um loyvi at seta fólk umborð, sýtti amerikanski skiparin, men tá herskipið hótti við at skjóta, slakaði hann. Spanskir herflotamenn gin-gu so umborð á amerikanska skipið og siglsu tað til lands.

Tilburðurin í gjár er tað seinasta í einum máli, sum byrjaði fyri fimm mánaðum síðani. Tá boðaðu sponsku myndugleikarnir frá, at ymsir virðismiklir lutir, sum Odyssey Explorer hevði funnið, helst stavaðu frá einum gomlum sponskum flutningsskipi, sum var sokkið í altjóða sjógvi.

Sponsku myndugleikarnir halda uppá, at Spania eigur alt, sum var í vrakinum, tá tað bleiv funnið, men ameri-kanararnir vísa á, at vrakið liggur á botni í altjóða sjógvi, og at einki einstakt land tí kann krevja ognar-rættin til vrakið ella tað, sum er í tí.

Amerikanararnir hava upplýst, at teir hava funnið 17 tons av gomlum silvur-myntum og ymsar lutir úr gulli í vrakinum. Virðið er mett til 2,6 mia. krónur.

### STUTT SAGT

### Loynilig rættarmál í Burma

Fólk, sum hava stríðst fyri betri mannarættindum í Burma, fáa harða revsing frá hernaðarstýrinum, verða tey tikin. Millum annað verður sagt frá einum 85 ára gomlum manni, sum er dømdur í fongsul, sjálvt um hansara avvarðandi halda uppá, at hann er ósekur. Eingin veit, hvat hendir á rætt-arfundunum, tí dyrnar í rættinum eru stongdar, og øll rættarmál eru flutt til ein bý 400 kilometrar frá Rangoon. Samstundis ljóðar, at herurin og løgreglan taka framvegis fólk, sum verða sett í samband við mótmælini herfyri.

### Hillary savnað 50 mió.

Hillary Clinton hevur nú savnað 35 mió. dollarar til stríðið um, hvør skal stilla upp sum forseta-valevni hjá demokrat-unum næsta heyst. Henn-ara harðasti kappingar-neyti, Barrack Obama, hevur verið næstan líka dúgligur, tí hann hevur savnað 32 mió. dollarar til sítt valstríð. Men Hillary hevur kortini meiri at taka av, tí hon hevur15 mió. dollarar afturat at taka til, um tað fer at standa á seinast í valstríðnum. Eisini repu-blikanararnir ætla sær at bríka nógvar pengar fyri at røkka uppstillingini. Rudy Giuliani sigst vera best fyri við næstan 17 mió. dollarum.

### Sviar missa nógvan skatt

Úrokningar hjá svenska skattavaldinum vísa, at svenski ríkiskassin missir einar 133 mia. svenskar krónur um ári í skatti. Av hesum stava 66 mia. krón-ur frá svørtum arbeiði, og harafturat fær ríkiskassin meiri enn 50 mia. krónur ov lítið í skatti frá vinnurekandi einstakling-um. Uppafturat aðrar sjey mia. krónur hvørva, tí fólk leita sær skattaskjól uttanlands.